# skipsvrakið í Hvalvík



*Mong hava sæð hesa myndina, tá tey koyra fram við landsvegnum í Hvalvík. Nógv vita, at hetta eru vrakpettir av sluppini Golden Harp, men tey fægstu vita nakað um sluppina og skipsbrotið at siga. Vit hava leitað í keldum, og við at lesa hesa greinina fáa fólk eina ábending um søguna aftanfyri skipsvrakið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

datt hann í dokkina og druknaði.

Í Føroya Siglingarsøgu síggja vit, at fyrsta skipið, sum Óla Jákup Poulsen úr Hósvík, vanliga róptur Óla Jákup í Toftum, førir, er Golden Harp. Hetta er í 1905. Óla Jákup er føddur 5. juni 1876 og doyr í mai mánaða í 1928.

Hans Jákup Joensen úr Svínáum, sum seinni búsetti seg á Borg á Argjum, førir sluppina í 1906. Vit lesa, at Hans Jákup á Borg, sum hann seinni varð róptur, sjálvur átti skipið hetta árið. Hans var føddur 2. mars í 1879 og tók sum so mangir aðrir skiparaprógv hjá Jens í Dali (1905).

Í 1909 førir Jóannes Isaksen av Viðareiði skipið. Jóannes er føddur 27. januar í 1886, og sambært siglingarsøguni flutti hann eisini niður til Danmarkar at búgva.

Árið eftir førir Jákup Joensen í Gerðum í Klaksvík Golden Harp. Hann er føddur 6. oktober í 1877.

### Seinasta keldan

Hesa løtuna úti á Landsbókasavninum detta vit eisini á, at Hans Erik Olsen í Heimistovu í Klaksvík førir skipið í 1912. Hans er føddur 13. september í 1984.

Í mai mánaða árið fyri keypir hann sluppina Vigil Star frá Jens í Dali og førir hana sjálvur. Men Hans Erik er ikki leingi skipaeigari í hesum umfari, tí longu tríggjar mánaðir seinni fer Vigil Star á land í Íslandi og verður vrak.

Hans Erik keypir síðan Phebe úr Havn, sum hann hevur í fleiri ár, men førir hana ongantíð sjálvur. Phebe verður seld aftur í desember 1925.

Seinastu kelduna um Golden Harp finna vit eisini í Føroya Siglingarsøgu.

Hetta er, tá Jan Jacobsen í Nólsoy førir sluppina árini 1915 og 1916.

Jan, sum tók skiparaprógv hjá Jens í Dali í 1904, er føddur 30. juli í 1880 og doyr 22. februar í 1944.

Á Landsbókasavninum hendan dagin funnu vit ikki fleiri keldur um Golden Harp, men um so er, at lesarar vita meira at siga um skipið og kanska serliga um hendingina

> *»…Tá í tíðini høvdu skipini lítlan motor, og tí eydnaðist tað ikki monnum at toga skipið av aftur sandoyruni í Hvalvík….«*

við skipsbrotinum, tá sluppin slítir og rekur á land, eru fólk vælkomin at senda okkum upplýsingar.

Einki er at ivast í, at vit í leitanin ikki eru komin fram til allar teir, sum førdu Golden Harp tey árini, hon var í okkara fiskiskipaflota.

Grækarin D. Magnussen, tíðindamaður og rithøvundur, sum er uppvaksin í Hvalvík, sigur, at hann sum blaðungur minnist ommubeiggja sín, Hanna Johansen, rætta tey, sum søgdu, at Golden Harp fórst fyri 1920.

Hanni búði hjá soni sínum á Lambareiði og var nógv inni á gólvinum í barnaheiminum hjá Grækarisi í Hvalvík . Sjálvur rópti Grækaris ommubeiggja sín Hanna á Lambareiði, tí hann búði á Lambareiði tey árini, Grækaris minnist mannin.

Hanni var vælmintur.

### Fórst í 1922

Grækaris D. Magnussen sigur, at Hanni avgjørdur helt uppá, at Golden Harp fórst í 1922 – og ikki í 1921 ella beint fyri 1920, sum onkrar keldur vilja vera við.

Skipið lá fyri teymi á fjørðinum, tá tað í illveðri sleit og rak á land.

Grækaris sigur, at vrakið hevur sæð tað sama út alla hansara tíð, og sum yngri plagdu teir at kava og kanna hesar forvitnisligu vrakrestir.

Hann heldur kortini ikki, at nógv var at síggja, og hann dugir ikki at minnast, at teir sóu annað enn timbrið, sum eftir er av Golden Harp.

Ein partur av vrakinum er sokkin niður í sandin, og síðan stinga endarnir av eikibondunum upp úr sjónum – og síggjast serliga væl, tá høg fjøra er á Hvalvíkini.

Nú hevur vrakið av Golden Harp so ligið út fyri oyruni í Hvalvík í sløk níti ár, og lítið man vera at ivast í, at tað verður seinur dagur, áðrenn veður og vindur hava gjørt enda á seinastu eikipettunum.

Vit valdu at skriva hesa søgu, so tey núlivandi forvitnu – og komandi ættarlið – hava høvi at vita eitt sindur um, hvaðani skipsvrakið á Hvalvíkini stavar.

Eyðsæð vantar nógv í hesi søgu, og óivað finnast fleiri keldur, men hetta er so tað, vit í eini handavend fingu burtur úr sluppini Golden Harp.

> *»…Seinastu kelduna um Golden Harp finna vit í Føroya Siglingarsøgu. Hetta er, tá Jan Jacobsen í Nólsoy førir sluppina árini 1915 og 1916… «*